# Einki óvæntað í hópinum

Brøndby skal hóskvøldið royna seg ímóti B36 í seinna innleiðandi UEFA CUP dystinum. Tom Køhlert, venjari í sigursvanda felagnum, hevur tikið út leikararnar, sum skulu royna at sleppa undan eyðmýkingini, um tað ikki eydnaðist at vinna seg víðari. Hesir eru í hópinum: Stephan Andersen, Max von Schlebrugge, Samuel Holmén, Kasper Lorentzen, Kim Daugaard, Alexander Farnerud, Morten Duncan Rasmussen, Chris Katongo, Peter Madsen, David Williams, Jon Jonsson, Tobias Mikkelsen, Stefan Gislason, Thomas Rasmussen, Jacob Berthelsen, Jan Kristiansen, Daniel Wass og Morten Cramer.



# Uppiborið stig til U19

Sum fyrireiking til undankappingina í oktober, luttekur U19 í Lyngby Cup, har føroyingarnir royna seg móti ymsum feløgum. Fyrsti dysturin í ársins útgávu av kappingini var á skránni í mánadagin. U19 spældi móti Hvidovre, og fingu dreingirnir eitt væl uppiborið stig. Heimasíðan hjá Fótbóltssambandinum skrivar, at dysturin var leiktur í umleið 30 hitastigum, so umstøðurnar vóru ikki heilt sum her heima. Hvidovre legði seg á odda í fyrra hálvleiki, men eftir stegðin fekk innskifti Jan Ellingsgaard javnvág í úrslitið. Danirnir løgdu seg aftur á odda, tá sjey minuttir restaðu av dystinum, men í tíðini sum dómarin hevði lagt aftrat javnaði Rógvi Holm til endaliga úrslitið 2-2. Samanumtikið vóru føroyingarnir væl við, og tað var uppiborið, at U19 fekk stig burtur úr dystinum.

## Soleiðis svimja teir:

Mikumorgun:
400 m frí, innleiðandi
100 m rygg, innleiðandi

Mikudag seinnapart:
400 m frí, finala
100 m rygg, hálvfinala

Hósdag seinnapart:
1500 m frí, finala
100 m rygg, finala

Fríggjamorgun:
200 m rygg, innleiðandi til hálvfinalu

Fríggjadag:
200 m rygg, hálvfinala

Leygarmorgun:
50 m rygg, innleiðandi til hálvfinalu
800 m frí, innleiðandi

Leygardag:
Hálvfinaluna í 50 m rygg
Finala í 200 m rygg
Finala í 800 m frí
Finala í 50 m rygg



*Føroyskir stuðlar í Beograd. Foreldrini hjá Pál Joensen, Thurid Kjærbo og Kaj Joensen. 12 ára gamli, Eyðbjørn, ið er lítlibeiggin hjá Pál, Malan Bærentsen, sum umframt at vera ein av fremstu svimjarum í landinum eisini er gentan hjá Pál, og hjúnini í grannalagnum hjá Pál og teimum í Vági, Jeanna og Hans Michael í Lágabø*

*Mynd: Jón Brian Hvidtfeldt*

# Stolt foreldur í Beograd

**Gerandisdagurin heima í Vági hevur síðstu árini verið merktur av, at hjúnini Thurid Kjærbo og Kaj Joensen hava fremsta, føroyska svimjara búgvandi heima. Men fyri fyrstu ferð eru foreldrini hjá Pál Joensen farin at fylgja soninum í kapping uttanlands**

SVIMJING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Tey eru sera spent. Fyri fyrstu ferð eru tey farin uttanlands at fylgja soninum, nú hann skal royna seg millum allar fremstu, ungu svimjarar úr øllum Evropa. Thurið Kjærbo og Kaj Joensen eru farin ta longu leið til Beograd í Serbia, har tey komandi dagarnar skulu fylgja 17 ára gamla soninum, ið svimur sín kjans fyri Føroyar.

Pál Joensen og Kári á Høvdanum umboða Føroyar í evropameistarakapping fyri juniorar. Meðan málsetningurin hjá unga svimjaranum úr Fuglafjarðar Svimjifelag er at røkka eini hálvfinalu og annars lyfta sítt altjóða støði upp á 800 FINA-stig, so hevur ungi svimjarin úr Suðuroyar Svimjifelag kjans at blanda seg millum teir allar fremstu í kappingini. Tað vilja foreldini uppliva.

– Avgerðin at fara avstað varð tikin fyri 3-4 mánaðum síðani, og síðani eru vit blivin alt meira spent, ikki minst eftir hansara framúr góðu úrslit til danmarksmei starakappingina fyrr í juli, sigur Kaj Joensen.

Tá avtornaði fóru foreldrini ikki einsamøll avstað. Við í ferðalagnum er eisini Eyðbjørn, 12 ára gamli lítlibeiggin hjá Pál, Malan Bærentsen, sum umframt at vera ein av fremstu svimjarum í landinum eisini er gentan hjá Pál, og hjúnini í grannalagnum hjá Pál og teimum í Vági, Jeanna og Hans Michael í Lágabø. Harumframt er Elmar, ið er stóribeiggin hjá Pál, væntandi niður til Beograd at fylgja við síðstu dagarnar av kappingini.

### Setir dagsskránna

Heima við hús í Vági hevur gerandisdagurin síðstu mongu árini verið merktur av svimjingini hjá Pál Joensen, ið byrjaði at svimja sum seks ára gamal.

– Vit royna at stuðla honum, tað vit kunnu. Við hús verður dagurin lagdur til rættis eftir honum, eitt nú maturin, friður til hvíld og so framvegis. Svimjing fyllir sera nógv, eisini í gerandisdegnum hjá okkum foreldrum, sigur Kaj Joensen.

Umframt at kompromissleysa stríðið hjá Pál Joensen at røkka tindunum hevur økt um áhugan hjá foreldrunum fyri svimjing í síni heild, so hava tey eisini valt at leggja nógv av síni tíð, fyrst í Vágs Svimjifelag, og seinni í samanlagda Suðuroyar Svimjifelag, har Pál Joensen svimur. Foreldrini fegnast um tað stóra arbeiði, ið Jón Bjarnason hevur gjørt fyri teirra son og felagið sum heild.

### Stolt av soninum

Dagarnar í Beograd ætla Thurid Kjærbo og Kaj Joensen sjálvsagt at síggja allar kappingarnar við føroyskari luttøku. Men foreldrini hjá Pál eru tó varin við at geva eitt boð uppá, hvussu tað fer at hilnast soninum.

– Eg tori ikki at siga. Men sjálvandi hava vit góðar vónir, og vit eru sera spent, sigur Kaj Joensen, sum er sera stoltur av soninum:

– Jú, tað kann eg siga fyri okkum bæði, at vit eru sera stolt av honum. Heilt avgjørt. Og eg haldi meg kunna siga, at øll Vágs bygd og Suðuroyggin sum heild stendur aftanfyri hann. Eg havi ikki tal á, hvussu nógv fólk hava biðið meg heilsa Pál, nú vit fóru her niður, sigur Kaj Joensen.

Føroyska ferðalagið fer aftur til Danmarkar sunnudagin, og har steðga tey til mikudagin, áðrenn leiðin gongur aftur til Føroya.

– Eg vóni at vit eftir kappingina um ikki annað fáa ein frídag saman við Pál, ein dag uttan venjing, sigur stolti pápin við einum skálkabrosi.

vinnaramentaliteturin lýsir úr venjarunum, ið hava lagt doyðin á at fáa sínar svimjarar trimmaðar til júst hesa kapping, ið verður teirra størsta avbjóðing sum juniorar. Umframt harða venjing leggja teir stóran dent á, at Pál og Kári liva rætt og fáa neyðugu hvíldina, so teir eru til reiðar til avbjóðingina. Hóast foreldur, lítlibeiggi og gentan hjá Pál eru komin til serbiska høvuðsstaðin í kvøld, týskvøld, so kemur ikki upp á tal, at tey koma framvið at vitja á hotellinum, har svimjararnir og venjarnir búgva. Nei, Pál og Kári skulu tíðliga í song, og so má hitt bíða til í morgin. Og ungu svimjararnir kenna týdningin av hvíld, og biðja góðanátt og tørna inn eftir eitt stutt prát við Sosialin.

### Málið

Fyrstu, innleiðandi kappingarnar, ið eru avgreiddar tá hesar linjur koma á prent, geva ábendingar um styrkina hjá Pál Joensen og Kára á Høvdanum. Pál svimur innleiðandi í 400 metur frí, Kári á Høvdanum innleiðandi í 100 metur rygg, og finaluumførini eru seinnapartin. Men undan kappingunum hava báðir gott mót:

– Fyrsta avbjóðingin er 400 frí, har eg liggi sum nummar trý. Eg fari at royna at svimja meg í finaluna og so síggja, hvat hendir har. Málið er at vinna so nógvar evropearar sum møguligt, sigur Pál Joensen við einum brosi.

– Mítt mál er fyrst og fremst at svimja meg upp á 800 FINA-stig. Fyrsta royndin er í 100 metrum frí, sum eg helst skal klára at svimja við tíðini 58,1 sekund. Tað fari eg eftir í dag, og so má eg taka tað harfrá, sigur Kári á Høvdanum.